# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Niðurleggið bara Skatta- og Avgjaldskærunevndina!

Grundin til at vit hava eina Skatta- og avgjaldskærunevnd er, at vanligi borgarin ókeypis skal kunna kæra skatta- og avgjaldsmál fyri at gera sín rætt galdandi, uttan at skula noyðast ta tungu og kostnaðarmiklu gongd í rættin. Borgarin kann tó til eina og hvørja tíð velja rættarinnar gongd, men tað er neyvan nakað, sum vanligi borgarin kann brúka til so nógv.

Um ein politiskt meinar nakað sum helst við Skatta- og avgjaldskærunevndini, so eigur TAKS at vera tvungið til at taka niðurstøðurnar hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini til eftirtektar. Hetta hevur eisini verið tann vanliga uppfatanin millum fólk og helst eisini verið politiska fatanin. Og avgerðir hjá nevndini eru eisini fataðar sum endaligar innan fyrisitingina.

Verjan hjá Palliba og Marsannu er burtur, um ókeypis kærumøguleikin bert er ein táta, og tey noyðast í rættin við tilhoyrandi kostnaði, um avgerðin gongur TAKS ímóti. Sakarmálskostnaður merkir ikki nógv fyri tað almenna, men fyri ein einstakling kann tað skjótt gerast ov møtumikið at fara í rættin, og so verða tað bara tey vælbjargaðu og ressourcusterku, sum hava nakra verju móti mistøkum og skeivum avgerðum hjá TAKS.

Er hetta nakað, sum politikarar og fíggjarmálaráðharrin kunnu standa inni fyri reint moralskt og politiskt?

At TAKS formliga kann fara í rættin, merkir ikki, at tað er rætt at gera tað. Í hesum førinum undirmáar hetta alla skipanina við Skatta- og avgjaldskærunevndini.

Hvør avgjørdi at fara í rættin við málinum aftaná, at Skatta- og avgjaldskærunevndin kom við sínari greiðu niðurstøðu um mvg av skrásetingargjaldi av bilum? Var tað TAKS av sínum eintingum? Var tað Fíggjarmálaráðið? Var avgerðin politisk? Vit bíða eftir svari, og vit skulu hava svarið.

Onkur má taka ábyrgd og avleiðingar av hesum máli. Gamaní er støðan óheppin, og tað er tungt hjá landskassanum at skula gjalda omanfyri 100 milliónur útaftur til borgaran, men antin hevur heimildin verið har, ella hevur hon ikki verið har. Málið er svart ella hvítt, og Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur talað.

Tað er ov bíligt av landstýrismanninum í fíggjarmálum bara at melda út, at hann hevur fult álit á, at TAKS fylgir teimum avgerðum sum rættarskipanin endaliga kemur til.

Landstýrismaðurin eigur at syrgja fyri, at TAKS fylgir teimum avgerðum, sum Skatta- og avgjaldskærunevndin endaliga kemur til. Vit tosa um eitt mál, sum ongantíð átti verið farið í rættarskipanina, og stundin er hjá Eidesgaard at seta punktum í málinum, heldur enn at senda svartaper víðari til ein komandi fíggjarmálaráðharra.

Vil hann ikki tað, so mátti hann í hvussu so er havt politiskan rygg til at avtikið Skatta- og avgjaldskærunevndina, tí at hon hevur einki endamál, um almennu Føroyar nokta at fylgja niðurstøðunum uttan rættarúrskurð.

**Sosialurin**

## Tøkk til Tjóðveldi og Sjálvstýrisflokkin

**BIRGIR WAAG HØGNESEN**
birgir@kallnet.fo



Tjóðveldisflokkurin ynskir nú Jóannes Eidesgaard í samráð í fíggjarnevndini, og Sjálvstýrisflokkurin ynskir at fáa Løgtingið at ógilda fyrningarfreistina. Hetta er heilt einastandandi, at tveir flokkar nú eru farnir at arbeiða fyri vanliga borgaran.

Eg haldi, at málið um tað stolna mvg'ið er ein skamblettur fyri politisku skipanina. At politikkarar, TAKS og tess avvarðandi vilja standa model til slíkan stuldur er óskiljandi, tí um vanligi borgarin bara skyldaði TAKS eitt fimmoyra, ja so var ikki leingi til pantifútin kom á gátt.

Fólkini, sum hava keypt bil, vistu sjálvandi ikki, at tey við lógini í hondini kundu fingið frá umleið 10.000 til 22.000 kr. pr. bil ella meir aftur frá TAKS, um bilasølan handlaði rætt. Í staðin fyri at viðganga, at ein feilur var í lógini, og at hon kundi tulkast, ja so beiv hon bara broytt til soleiðis, at hon passaði til TAKS. Men peningurin, sum tá var goldin ov nógv, átti tá at verið útgoldin umgangandi.

At Jóannes Eidesgaard er landsstýrismaður í skatta -og avgjaldsmálum hvørki forðar ella frítekur hann fyri at hava eina persónliga meining sína egna og floksins vegna. Eg veit, at Jóannes er ein skilamaður, og tí er tað eisini harmuligt, at hann er so loyalur ímóti systeminum, sum hann er.

Var hann rættvísur mótvegis veljarunum, so fekk flakakvinnan, arbeiðsmaðurin og annars láglønt í hesum døgum ein kekk aftur frá TAKS, tí hóast tey ikki forvunnu nógv, í tíðar¬skeiðnum, tá TAKS av órøttum tók mvg'ið, so hava tey helst eisini keypt bil í tíðar¬skeiðnum.

Hevði Jóannes sitið í andstøðu, ja so rópti hann helst harðast, at fólkið skuldi hava mvg'ið aftur, men av tí, at hann er politikarin Jóannes, so er hann bundin at hava eina meining, sum hann í veruleikanum ikki hevur. Og eg spyrji, hvar eru Bjarni Djurholm, Gerhard Lognberg og Magni Laksafoss í hesum málinum, teir sum útgeva seg fyri at verða fólksins politikarar, tá teir skriva.

Sambandsflokkurin – íroknað útbrótaran Magni Laksafoss – situr sum nikkudukka og heldur við fíggjarmálaráðnum, bara tí at sambandsmaðurin Bárður Nielsen sat sum landstyrismaður, tá fólk knappliga varnaðust, at lógin var ikki heilt so greið. Bárður broytti lógina soleiðis, at vanligi borgarin fekk langa nøs.

Miðflokkurin, sum síðan 1992 hevur rópt hart um at fólk eiga at fáa hús síni aftur, sum tey mistu av kreppuni, rópar ikki í dag, nei nú er vent í holuni. Orsøkin er, at Karsten Hansen, sum nú er miðflokkamaður, var fíggjarmálaráharri part av tíðarskeiðnum, tá mvg'ið varð stolið frá bileigarunum. Vit kundu sett spurningin: Er Miðflokkurin ikki við uppá, at bileigarar fáa sítt stolna mvg aftur, sum landið hevur tikið inn av órøttum?

Karsten kláraði so at broyta lógina til frama fyri tey ríku, sum í 80'unum komu illa fyri av skipabygging og komu at skylda pening til landskassan. Har megnaði hann at gera tað so, at lógin bleiv broytt til eina lagaliga skipan, so tey ríku nú kunnu gjalda spakuliga og so at húsini og aðrar ognir ikki blíva tikin av pantifútanum, ja, munur á tá tað eru tey ríku ...

Eg úttali meg ikki, tí eg persónliga eri raktur av hesum, men máti skal vera við, at vera landsins tænari. Ein stór tøkk til Tjóðveldisflokkin og Torbjørn Jacobsen, sum eg vóni ikki bara gera hetta av populistiskum orsøkum, men meina nakað við hetta. Til endans ein tøkk til Sjálvstyrisflokkin, at tit tora at verða fólksins tænarar, tað er ikki á hvørjum degi tað hendir.



*Hvønn part av bilinum tekur Taks næstu ferð?*

## Rætting

**GERHARD LOGNBERG**



Rætting til rættingina til blaðið Punktun.fo. har eg av misgáðum ella í skundi eri komin til at skriva skydmann mín, fyri Hákun Desederius Poulsen, hetta er sjálvsagt skeivt, hann varð doyptur Hákun Djurhuus, sum helst er almenn vitan.

Eg biði um umbering fyri hetta mistak.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.